# Ein risaavbjóðing fyri føroyska ferðavinnu!

SV. AAGE ELLEFSEN
Hotel Streym



**Almenna partafelagið Smyril Line steðgar norskum, svenskum og bretskum ferðafólkum at vitja Føroyar**

Nú hitt almenna yvirtekur Smyril Line, verður boðað frá, at Norrøna skal gevast at sigla til Noregs og Skotlands. Frameftir skal skipið einans sigla beinleiðis til Íslands umvegis Havnina, heldur enn at bróta íslandsferðina av við einum avstingara til Bergens.

Umframt hendan túrin, sum helst er ætlaður at flyta danskarar og suðureuropearar beinleiðis til Íslands, skal skipið gera ein túr bert millum Føroyar og Danmark.

Men hesum túrinum koma fyrst og fremst føroyingar at gera nýtslu av.

Nú Noregs- og Skotlandstúrarnir falla burtur, síggja vit sjálvsagt ikki ferðafólk úr hesum londunum í egnum bili aftur í Føroyum, og tað verður eitt stórt afturstig.

Men tað, sum verður til uppaftur størri skaða fyri føroysku incoming ferðavinnuna, er, at fjøldin av gestum frá europeiska meginlandinum, sum vitjaðu Føroyar á ferðini til Íslands ella á veg heimaftur, nú verða burtur, tí tey eftir nýggju ferðaætlanini fara at gera ferðina til Íslands uttan at steðga á í Føroyum.

**Ringast fyri veitarar á bygd**

Eftir gomlu ferðaætlanini vóru allir útlendingar, sum fóru til Íslands við egnum bili, tvingaðir at gista, eta og gera útferðir í Føroyum í tveir ella tríggjar dagar, meðan bíðað varð eftir skipinum. Danir og suðureuropearar, sum komu yvir Danmark, máttu búleikast her frá mánadegi til mikudag, meðan skipið fór til Noregs, og norðmenn, svenskarar og onnur, ið komu yvir Bergen, noyddust at bíða her á heimferðini frá fríggjadegi til mánadag, meðan skipið var í Danmark.

Tá slapp eingin útlendingur undan at ferðast í Føroyum á íslandsferðini, mótsatt nýggju ætlanini, nú útlendsku íslandsfararnir einans koma at síggja Føroyar frá bátadekkinum á Norrønu.

Sostatt høggur almenna felagið við einum høggi av alt tað, sum uppbygt er seinastu 30 árini, hvat føroyskari incoming ferðavinnu viðvíkjur, tá umræður útlendsk ferða-fólk í egnum bili!

Og av tí tey vóru í egnum bili, vitjaðu flestu teirra heldur á bygd enn í bý, og tí fer tjóðartøkan av skipinum at svíða fastast hjá teimum við veitingartiltøkum á bygd.

Tað er harmuligt, tí nógvar smáfyritøkur og einstaklingar á bygd hava brúkt tíð, kreftir og pengar at byggja upp eitthvørt veitingartiltak, sum nú tykist fara fyri bakka!

Men øllum hesum hevur stjórin í Samvit greitt frá í fjølmiðlunum, so tað politiska tiltaki viðvíkjandi Norrønu varð alt gjørt vitandi um viðurskiftini.

**Ætlar hitt almenna at seta nakað í staðin?**

Spurningurin er nú, um hitt almenna – løgting og landsstýri – bert vil bróta niður, tað sum ferðavinnan við tógvið stríð í langar tíðir hevur uppbygt, ella tey hava nakað annað eins gott og gevandi at seta í staðin.

Hevur politiska systemið ikki tað, má marknaðarføringin av Føroyum sum ferðamál púrasta umleggjast beinanvegin!

Skal skaðin, sum almenna átakið viðførir, bert partvís bøtast, verður neyðugt bæði við skjótum og dýrum søluframtøkum!

Í fyrsta lagi skulu suðureuropearar, ið ferðast norðureftir í egnum bili, sannførast um, at Føroyar í sjálvum sær eru verdar at vitja. Tey skulu heldur velja sær Føroyar burturav enn at fara longu leiðina heilt til Íslands. Tað skal verða nýggi boðskapurin!

Í øðrum lagi skulu tey, sum kortini fara til Íslands, fáast at steðga á í Føroyum – antin á út- ella heimferðini - meðan Norrøna ger eykatúrin til Danmarkar.

Tað, sum tey áður vórðu tvingaði til, skal søluarbeiði nú fáa tey at velja av fríum vilja!

**Munandi meirjáttan skal til!**

Men her skulu stórsligin átøk til. Og hesi átøk krevja miklan pening og stórt arbeiði!

So spurningurin verður, hvørt landsmynduleikarnir vilja síggja skaðan, tjóðartikna reiðaríið ger, og um tey vilja ganga í seg sjálvan hesum viðvíkjandi.

Tí! Skal skaðin bert smávegis afturbøtast, má fíggjarlógin fyri 2009 meirjátta ferðavinnuni munandi upphæddir til marknaðarføring av Føroyum sambært nýggju ferðaætlanini hjá nú almenna ferðamannaskipinum!

# Betri bústaðir og lægri oljurokning

MARITA HENTZE
Set kross við lista A

Eg vil arbeiða fyri at borgarar í Tórshavnar Kommunu skula fáa lægri oljurokningar og fjálgari hús.

Sum sethúsa og íbúðarbygning er í dag, eru olju rokningarnar alt ov høgar og kemst hettar av at íbúðir og sethús ikki eru bygd til at halda hitanum inni, men at hita fuglarnir á tekjuni.

Hetta sjálvt um húsini eru bygd eftir byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og lúka øll krøv.

Eg vil arbeiða fyri at broyta byggjureglugerðina so at húsini verða líti dýrari at byggja, men verða nógv bíligari at hita.

**Dømi, Vanlig sethús:**

Hús bygd eftir galdandi byggisamtykt hjá Tórshavnar Kommunu brúka 4000 litrar av olju um ári

Við verandi orkuprísum svarar tað til 28000 kr.

Var Húsið bygt eftir tilráðingini frá Orkuráðnum 1986, vildi brúkið verði 2000 litrar av olju um ári.

Við verandi orkuprísum svarar tað til 14000 kr.
Munur 14000 kr.

Hús bygd eftir Donskum reglum í dag. Brúka 1200 litrar av olju um ári.

Við verandi orkuprísum svarar tað til 8400 kr.
Munur 19600 kr.

Har afturat fær man eini behagilig og fjálg hús, eini hús hvar slepst undan gólvkulda og trekkið. Eisini kunnu flestu av teimum mongu gølum í byggjuvinnuni, sum nógv fólk eru komin illa fyri av, umgangast.

Tað er heilt víst at hetta eru broytingar ið bata, og sum man vil merkja í tí dagliga húsarhaldinum.

# Kom og tak eitt tak saman við mær

STEINFINNUR MITTELSTEIN
- eri at finna á lista B



**Eg fari at heita á teg sum borgara at nýta møguleikan og seta ein kross fyri:**

- Betri samband millum borgara og kommunu
- Fleiri røktarheim til gomul, og tey sum ikki eru før fyri at klára seg sjálvi
- Dagføra høllina á Hálsi
- Høll á Argjum
- Dagføra gomlu skúlarnar
- Nýggjan musikkskúla
- Grundstykkir, sum borgarin ynskir
- Altjóða gera ovara vøll í Gundadali, so hann lýkur altjóða krøv
- Útbyggja svimjihøllina (50 metur hyl)
- Fáa lív aftur í handils- og mentunarlívið í býinum
- Økja um parkeringsmøguleikarnar í býinum
- Fleiri bátapláss
- Steðga ørvitis ætlanini við Sundsvegin
- Skilagóðan og varnan fíggjarpolitikk

Ynskir tú hettar, so er at seta kross fyri: B

# Leingi er áðrenn væl skal vera

TÓRI RESTORFF JACOBSEN
Formaður

Seinastu tíðina hevur Tórshavnar Musikkskúli havt nógva umrøðu í miðlunum og millum manna. Serliga eru tað politikarar og valevni til komandi býráðsval ið ynskja tónleikinum gull og grønar skógir.Í so máta alt gott um hetta,tað er vælsaktans vælmeint.

Men annars er ikki nógv nýtt undir sólini,summi valevni tváa sær sum vant um hendurnar ,og siga seg einki hava vitað um hetta mál fyrr enn nú,meðan onnur siga seg hava roynt at geva musikkskúlanum betri umstøður.

Vónandi liggur nakað aftanfyri alla hesa vælvild, tí fyri góðum hálvum ári síðani var trivnaðarkanning gjørd millum lærarарnar ið starvast á Tórshavnar musikkskúla,og vísti hon klárt at stórur partur av lærarанum hava umhugsað at finna sær annað starv.

Ein av orsøkunum til henda mistrivnað liggur í tí at bygningarnir sum Tórshavnar Musikkskúli húsast í eru lappaloysnir –og sjálvt um lærarnir hava víst stórt tolsemi og roynt at røkja sítt starv sum frægast er tolið nú við at vera uppi.

Vit fegnast øll um góðu úrslitini í Tórshavnar Musikkskúli kann vísa á, men skal henda mennin halda fram er alneyðugt at hann fær betri umstøður.

Vegna lærararáðsnevndina.

# Don't worry – Be happy

KITTY MAY ELLEFSEN



Hóast kreppa er í heimsbúskapinum, og ringar tíðir lúra um allan heimin, eiga eg og tú ikki at setast afturá, og missa móti. Nei, tað er nú vit veruliga eiga at fara til verka . Lat okkum halda høvdi kalt, hava yvirskot og hoyrast um allar geilar!

Hjá okkum vanligu borgarum minnir støðan ikki sørt um støðuna fyrst í 90 inum. Smyril Line má bjargast av Marsannu og Palleba, ringar tíðir í Klaksvík og Suðroy, har skip og flakavirkir hava givið upp ondina.

Men sambært Julie Lindegaard, kommunikatiónsleiðara so eiga vit at arbeiða offensivt í krepputíðum. So meðan aðrar fyritøkur trekkja seg, lata hurðina aftur og tiga, eiga vit í Føroyum at gera dalt av rúminum vit brádliga fáa. Í hesum døgum verður nógv spart, og mangan verður marknaðarføring og pr ikki ráðfest serliga høgt.

# Planting av býnum og í kringumhvørvinum

ALBERT ISFELD
arkitektur



**Vit skulu planta túsund trø................**

Vit skulu planta 1000 trø! Vit fara at ganga í fótasporum Djóna í Geil, og planta miðbýin av nýggjum.

Planting í stórum í Suðurstreymi skal verða so gjøgnumførd, at restin av landinum fer at taka hetta til sín sum ein frymil fyri planting um alt landið. Dentur fer tá at verða lagdur á at velja trø, sum vaksa væl í Føroyum.

Umframt at skapa hugna og vakurleika, er síðuvinningurin at varðveita og skapa mold og lívd, og samstundis fer hitin á staðnum at hækka 1-2 stig og skapa betri livilíkindi hjá plantum og djórum, og í síðsta enda hjá menniskjum.

Tað eigur ikki at bera til uttan víðari at fella trø inni í býnum, og um hetta verður gjørt, skal viðkomandi sektast fyri illgerningin og verða álagdur at planta nýtt fyri tað felda træi.

Vit sum hava verið í Bergen siggja hvussu vakur hesin býur er við trækløddum fjøllum og líðum.

Fyri um 150 árum síðan var einki træ í Bergen, tað vit síggja eru planta trø.

Til ber eisini hjá okkum at planta, um ikki so nógv og tætt, so ber til við planting í líðum og dølum at skapa hugnaligar og fjálgar viðalundir.

**Vit skulu planta túsund trø.......**